# Olja og sigling geva avlop

Tað kom óvart á teir flestu donsku búskaparfrøðingarnar, tá tann seinasta uppgerðin hjá hagstovuni í Keypmannahavn vísti, at Danmark hevði 8,8 milliardir krónur í avlopi á gjaldsjavanum í august mánað. Búskaparfrøðingar høvdu væntað avlop, men ikki so stórt, skrivar Ritzau.

Hagtølini vísa, at tað eru serliga oljan og farmasiglingin, sum geva tað stóra avlopið. Avlopið í farmavinnuni var 38 milliardir krónur, og oljan togar 28 milliardir krónur tann rætta vegin.

- Høg farmagjøld og góður oljuprísur gera sítt, sigur búskaparfrøðingurin Anders Matzen við Ritzau. Hann ávarar samstundis danir ímóti at taka tað stóra avlopið á gjaldsjavnanum sum eitt tekin um, at alr er ein dansur á rósum.

-Avlopið ger virðið á krónuni tryggari, men inntøkurnar frá farmasiglingini og oljuni í Norðsjónum fjala samstundis, at tað er framvegis vandi fyri yvirhiting í búskapinum, sigur Anders Matzen, sum dagliga starvast sum ráðgevi í Nordea-bankanum.



# juskipunum

kunnu bara hugsa sær, hvussu tað hevði verið, um vit valdu at halda fram í føroyska flotanum, siga teir báðir.

- Um vit høvdu hildið fram í føroyska flotanum, so høvdu vit uttan iva mist Arctic Viking, og tað vildu vit ikki. Tí kunnu vit siga, at vit tóku einastu røttu avgerðina, tá vit valdu at flagga yvir til Litava.

### Frægari útlit fyri framtíðina

Nú hevur rækjufiskiskapur verið í einum aldudali í fleiri ár. Prísurin á rækjum hevur verið sera lágur, og prísurin á oljuni sera høgur. Hóast tað valdu eigararnir í Arctic Viking at koma aftur undir føroyskt flagg, tá avtalan hjá teimum við litavisku myndugleikarnar gekk út í november 2005.

- Vit sóu betri møguleikar við at koma aftur undir føroyskt flagg. Nú eru vóru færri rækjutrolarar í føroyska flotanum, og tí kvotan hjá hvørjum einstøkum trolara størri. Í hesum sambandi hildu vit tað vera rætt at venda nøsini heim aftur.

Nú er Arctic Viking so komin heim aftur, og teir hava sum heild betri vónir um framtíðina. Sjálvt um teir hava havt mótgongd við bæði svingandi rækjuprísi, hækkandi oljuprísi og øðrum, so eru teir einasti føroyski rækjutrolari, sum hevur verið undir sama felag øll árini.

Hetta má metast sum eitt bragd, og tað vísir eisini, at fólkið aftanfyri Arctic Viking hevur tikið rættar avgerðir í røttu løtunum.

Eftir keðiligu árini frá 2002 - 2006, so tykist tað, sum um prísurin á rækjunum aftur kvinkar rætta vegin. Harafturat lækkar oljuprísurin, so eigararnir á Arctic Viking hava betri vónir um framtíðina.

- Nú sær frægari út hjá rækjuflotanum. Prísurin á rækjum er hækkandi, og oljuprísurin lækkandi. Vónandi er hetta eitt tekin um, at gongdin hjá rækjutrolarunum fer at venda nú, siga báðir skipararnir.

Arctic Viking hevur nú havt heimstað í Kollafirði í meir enn 20 ár. Sama felag stendur enn aftan fyri rækjutrolaran, og framtíðin sær ljósari út. Nú er bert eftir at vóna, at rækjuprísurin heldur fram at hækka, soleiðis at rækjuskipum aftur verður lív lagað í Føroyum.



*- Um vit høvdu hildið fram í føroyska flotanum, so høvdu vit uttan iva mist Arctic Viking, og tað vildu vit ikki, siga skipararnir umborð. Her síggja vit mynd av tveimum av manningini við Arctic Viking í bakgrundini.*




*Fyrr í ár var Arctic Viking á fyrsta sinni inni í Angmassalik í Eysturgrønlandi. Angmassalik er dekkað av ísi stóran part av árinum, og tí hendir tað ikki ofta, at skip fara inn til Angmassalik. Her er mynd av Arctic Viking inni í Angmassalik.*

# Royna at halda vónini

**Roknskapurin hjá P/F Líðin hevur verið dapur lesnaður seinnu árini. Men útlit fyri hækkandi rækjuprísum gera tó, at reiðaríið enn hevur ein vón um betri framtíð**

ROKNSKAPUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Røkjuvinnan hevur havt tað alt annað enn gott nú í fleiri ár. Eitt fyri og annað eftir eru skipini farin av landinum. Tað hendi sum so eisini fyri Arctic Viking, men hetta var tí skipið flaggaði út í eini roynd at bøta um raksturin.

Hall hevur tó framvegis verið, og tað er ein gongd, sum illa fær hildið fram. Ikki minst tá hugsað verður um, at eginpeningurin væl og virðiliga er negativur við árslok 2005. Eitt hampuligt gjaldføri hevði fram til og við 2004 við sær, at skuldin til ognarar ikki gjørdist ov stór, men tað er sjónligt, at felagið hevur havt tað hart síðani.

Í ársfrágreiðingini staðfestir leiðslan eisini, at framhaldandi rakstur er treytaður av, at sølan nú fer at vignast betri. Sagt verður, at felagið í ár hevur betri og størri veiðirættindi, enn tað áður hevur havt, og saman við hækkandi rækjuprísum ger hetta, at roknað verður við einum positivum úrsliti í 2006.

| P/F Líðin | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Høvuðstøl (tkr.)** | **2002** | **2003** | **2004** | **2005** |
| Nettosøla | 25.287 | 26.279 | 22.058 | 21.624 |
| Bruttovinningur | 12.258 | 5.800 | 4.660 | 6.402 |
| Úrslit áðrenn rentur | -1.911 | -5.208 | -3.100 | -2.862 |
| Ársúrslit | | | | |
| Ogn í umferð | 6.710 | 3.773 | 1.572 | 7.847 |
| Stuttfreistað skuld | 8.027 | 8.939 | 8.477 | 13.508 |
| Eginpeningur | 6.704 | 1.497 | -203 | -3.067 |
| Fíggjarjavnvág | 37.517 | 31.025 | 27.151 | 28.923 |
| **Lyklatøl** | | | | |
| Gjaldførislutfall | 84 | 42 | 119 | 58 |
| Ognaravkast | -6 | -21 | -8 | -5 |
| Soliditetur | 18 | 5 | -1 | -11 |